UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

Tórshavn, tann 19. januar 2016
J.Nr.: 16/00063
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: jd

**Løgtingsmál nr. /2015. Uppskot til løgtingslóg um matvørur** (Um at loyva sølu av siðbundnum føroyskum matvørum í smásølu)

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matvørur**
(Um at loyva sølu av siðbundnum føroyskum matvørum í smásølu)

Í løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010, sum broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 22. mai 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**§ 1**

1) Í § 32 verður sett sum nýtt stk. 2:
"*Stk. 2.* Framleiðsla eftir stk. 1 kann eisini seljast brúkarum umvegis heil- ella smásølu eftir reglum, ásettar við heimild í hesi lóg."

2) Stk. 2, sum eftir hetta verður stk. 3, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um slátur hjá framleiðarum í fyrsta liði av djórum og um treytirnar fyri slátur og marknaðarføring hjá framleiðarum frá egnum virki beinleiðis ella umvegis smásølu til brúkaran at nýta í privata húsarhaldi hansara. Á sama hátt kann landsstýrismaðurin áseta reglur um slátur hjá framleiðarum í fyrsta liði av djórum og um treytirnar fyri slátur og marknaðarføring hjá framleiðarum frá egnum virki til brúkaran at keypa í smásølu."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.

## Viðmerkingar til lógaruppskotið

### Kap. 1. Almennar viðmerkingar

#### 1. Endamálið við lógini.

Lógaruppskotið hevur til endamáls at liberalisera matvørulógina soleiðis, at tað fer at bera til at selja siðbundan føroyskan mat, sum ikki er virkaður á løggildum matvøruvirki, í matvøruhandlum og við torgsølu. Tær siðbundnu matvørur, sum sjálv lógarbroytingin viðvíkur, eru seyða- og neytakjøt. Sostatt fevnir ásetingin, sum verður broytt, ikki um fisk og fiskavørur, grind ella aðra veiðu ella grønmeti. Landsstýrismaðurin hevur, eftir § 26, stk. 3 í

matvørulógini, sum er heimild at áseta reglur um, at ávís matvøruvirki eru undantikin kravinum um løggilding og skráseting. Henda áseting gevur landsstýrismanninum heimild at áseta serligar reglur fyri tey, sum við *Heimaframleiðslu* framleiða matvørur úr rávørum, sum ikki eru fevndar av § 32.

Í løtuni kann siðbundin føroysk framleiðsla, t.e. í hesum føri seyða- og neytakjøt, einans seljast í durasølu, sbr. tó galdandi undantak í § 60, stk. 2. Hetta undantak fer úr gildi 1. januar 2017.

Galdandi matvørulóg er í samsvari við ta lóggávu, sum er galdandi í ES, men hetta er fyrst og fremst grundað á, at samsvarandi matvørulóggáva ger tað lættari at útflyta føroyskan fisk og fiskavørur til ES. Tað er ikki eitt ES-krav, at matvørulóggávan er tann sama, og føroyski heimamarknaðurin kann tí í útgangsstøði skipast soleiðis, sum føroyskir myndugleikar halda vera rættast í mun til serføroysk viðurskifti.

Ásannað verður tí, at á ávísum økjum er matvørulógin ov avmarkandi og forðar fyri skynsamari gagnnýtslu av føroyska náttúrutilfeinginum til matna. Føroyska samfelagið er í størri mun vorðið eitt brúkarasamfelag, har borgarin ikki longur hevur møguleika at ogna sær siðbundar føroyskar matvørur frá familju, vinum og kenningum. Fyrr á døgum hevði eitt húsarhald í nærsambondum atgongd til fisk, kjøt og føroyska avgrøði. Óformliga býtissamfelagið finst enn, men í minni mun enn áður. Stórur partur av føroyingum noyðist nú í handlarnar at keypa matvørur til dagligt brúk.

Alheimsrákið seinastu árini er, at brúkarin í størri mun ynskir at nýta matvørur, framleiddar í nærumhvørvinum. Siðbundin føroysk framleiðsla kann keypast í durasølu, men slík søla er tíðar- og orkukrevjandi fyri bæði seljara og keypara.

Føroyska matarmentanin er stórur partur av føroyska samleikanum, og ansast má eftir, at føroyska lóggávan hevur neyðuga fyriliti fyri hesum. Føroysk lóggáva skal hóska til føroysk viðurskifti, og tryggjast má, at føroyska matarmentanin ikki fer fyri skeytið, tí lóggávan leggur seg uppat útlendskum lóggávusiði, ið ikki hóskar til føroysk viðurskifti, heldur enn at gera lóggávu, sum hóskar til føroyska samfelagið.

Endamálið við ætlaðu broytingunum er at tryggja, at smáir føroyskir framleiðarar fáa høvi at selja sína vøru til ein størri skara, eins og endamálið er at trygga, at føroyska matarmentanin verður varðveitt og ment í samsvari við rákið í dag. Skipanin við *Heimablídni*, sum hevur verið galdandi nøkur ár, tykist virka væl, eins og durasølan, ið hevur mong ár á baki, virkar væl. Ætlanin er ikki at broyta nakað hesum viðvíkjandi. Ætlanin er tó at loyva smærri framleiðarum at selja sína vøru í smásølu, t.e. í handlum, eins og ætlanin er at skipa fyri, at føroysk vøra kann seljast við torgsølu, eitt nú í Vágsbotni. Henda skipan kundi hóskandi verið kallað *Heimaframleiðsla*. Í roynd og veru er talan um at víðka durasøluhugtakið. Fyri at hetta skal kunna bera til, er neyðugt at gera ávísar tillagingar í verandi matvørulóggávu.

Gjørt verður vart við, at tað eisini við hesum broytingum framhaldandi verður framleiðarin, sum hevur ábyrgdina av, at framleidda vøran er í lagi, sbr. §§ 3-5 og § 26 í matvørulógini og ásetingarnar í kunngerð um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum. Hetta er galdandi uttan mun til, um vøran verður framleidd á løggildum virki ella seld í durasølu ella torgsølu. Neyðugt er at broyta matvørulógina, um siðbundin føroyskur matur, sum ikki er virkaður á løggildum matvøruvirki, skal seljast brúkarunum í handlum (smásøla). Ítøkiliga er neyðugt at strika ásetingina um, at siðbundin føroysk framleiðsla einans kann seljast í heil- og smásølu fram til 1. januar 2017. Harumframt er neyðugt at broyta aðrar ásetingar, soleiðis at søla av siðbundnum føroyskum mati ikki er avmarkað til durasølu.

Afturat hesum er neyðugt at seta í verk eina skipan við skráseting av framleiðarum soleiðis, at tað altíð ber til at eyðmerkja framleiðaran. Ætlanin er, at Heilsufrøðiliga starvsstovan skal umsita hesa skráseting.

Neyvaru reglurnar, t.e. reglur um týðandi vøruupplýsingar til brúkaran og reglur um marknaðarføring og merking av matvørum, verða ásettar í kunngerð. Hesar kunngerðarheimildir eru longu í matvørulógini.

**2. Ummæli**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Føroya Bóndafelag, Føroya Kommunufelag, Handilsvinnufelagnum, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Landsdjóralæknanum, Óðalsfelagnum, Útoyggjafelagnum, Vinnuhúsinum, privatstarvandi djóralæknunum og stjórnarráðunum.

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

**1. Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri landið**
Mett verður, at uppskotið hevur nakað av fíggjarligum og umsitingarligum avleiðingum við sær fyri landið, tí Heilsufrøðiliga starvsstovan skal halda og dagføra neyðugu skrásetingina.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**2. Fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður, at uppskotið hevur bæði positivar og negativar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna. Fyri landbúnaðar- og frítíðarfiskivinnuna kann uppskotið hava við sær positivar fíggjarligar avleiðingar. Inntøkugrundarlagið verður breiðkað, tí framleiðararnir – uttan at gera dýrar íløgur í framleiðslutól og -umstøður annars – kunnu selja sína framleiðslu til ein størri skara enn frammanundan.

Fyri ta vinnuna, sum virkar umrøddu matvørurnar undir verandi skipan, kann uppskotið hava ta fíggjarligu avleiðing, at framleiðslan og við tí eisini sølan minkar. Samstundis kann uppskotið hava við sær, at vinnan hevur gjørt íløgur í framleiðslutól, sum ikki verða brúkt í tann mun, tey kundu, um lógin ikki varð broytt. Roknað verður tó við, at ein stórur partur av brúkarunum framvegis fer at keypa ta vøruna, sum er framleidd á løggildum matvøruvirki, heldur enn at keypa óløggilda vøru. Trupult er at meta um, hvussu sølan verður býtt millum løggilda og óløggilda vøru.

**3. Umhvørvisavleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur. Uppskotið hevur heldur ikki avleiðingar í mun til Evropeiska Mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek.

**6. Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**
***Til nr. 1***
Ásett verður í § 32, stk. 2, at siðbundin føroysk framleiðsla, t.e. seyða- og neytakjøt, kann seljast brúkaranum umvegis heil- ella smásølu, t.e. í matvøruhandlum. Henda søla skal gerast eftir reglum, ið verða ásettar við heimild í hesi lóg.

***Til nr. 2***
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta reglur um, hvussu slátur hjá framleiðarum í fyrsta liði, kann seljast brúkarum á annan hátt enn við durasølu. Somuleiðis verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um, hvussu slík framleiðsla skal marknaðarførast og seljast í smálsølu, t.e. í matvøruhandlum, og við torgsølu.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu. Lógin fær gildi samstundis, sum undantakið í § 60, stk. 2 fer úr gildi. Á henda hátt ber til at sleppa undan einum tíðarskeiði, har tað ikki er loyvt at selja siðbundna føroyska framleiðslu í handlum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, [dato]

Poul Michelsen
Landsstýrismaður

/ Bjørgfríð Ludvig